## Aftur út at døma

Enn eina ferð eru boð eftir føroyska dómaraparinum í hondbólti, Andreas F. Hansen og Eyðuni Samuelsen, uttan fyri landoddarnar. Teir báðir skulu til Hollands, har teir 7. november døma dyst millum hollendska Kiddy World og grikska O.F.N. Ionias í triðja umfari í Europa Cup-kappingini fyri steypavinnarar hjá kvinnum. Hetta er seinni av tveimum dystum millum liðini bæði.



## Eingin vil í nevnd

Tá Tvøroyrar Bóltfelag sunnudagin hevði aðalfund, gjørdist neyðugt at slíta aðalfundin, tí eingin av teimum uppmøttu vildi upp í nevndina. Bæði Jóhan Petur Olgarsson og Mina Joensen høvdu frammanundan boðað frá, at tey ikki tóku við afturvali, men hóast uppmøtingin var góð, vildi eingin lata seg stilla upp, skrivar Suðuroyarportalurin. Sostatt var aðalfundurin slitin og ásettur at halda fram um eina viku, sunnudagin 1. november klokkan 17.

# Baðibóltar, ónøgd og Owen!

**Sosialurin var á staðnum, tá Liverpool sunnudagin vann á Manchester United. Á skránni vóru baðibóltar, mótmælisgonga, háðan av hvørjum øðrum og ikki minst ein spennandi og hendingaríkur dystur**




Tróndur Arge

Hóast dysturin ikki byrjaði fyrr enn klokkan tvey lokala tíð, so var fult av fólki rundan um Anfield longu um miðdagsleitið. Nøkur fingu sær okkurt at eta og drekka. Onnur keyptu sær ymiskar Liverpool lutir í »The Kop Shop«, meðan fleiri royndu at halda seg til har, sum leikarnir og allir VIP gestirnir koma inn.

Tað var ein stjørnuparada av fyrrverandi leikarum, sum høvdu valt at komið á Anfield til grannuppgerðina. Fyrstur var Sir Bobby Charlton, sum fekk eina vinarliga móttøku frá Liverpool-viðhaldsfólkinum, ið vóru til staðar. Síðani komu fyrrverandi Liverpool-leikararnir Kenny Dalglish, John Aldridge, David Fairclough og Sami Hyypia. Serliga Sami Hyypia fekk eina megnar móttøku. Mitt í rokanum stóð eisini kendi franski fyrrverandi landsliðsleikarin Marcel Desailly.

Løtu seinni komu leikarabussarnir. Fyrst kom bussurin við Liverpool-leikarunum. Fyrstur úr bussinum var til tíðir útskeldaði venjarin, Rafael Benitez, og honum á baki komu so leikararnir, ein fyri og annar eftir. Serliga Fernando Torres fekk eina heita móttøku.

Hinvegin fingu Manchester United-leikararnir av at vita, tá teir komu úr bussinum stutt eftir, og maðurin, ið øll vóru eftir, var fyrrverandi Liverpool-leikarin, Michael Owen. Hóast nógv góð ár í Liverpool fram til 2004, so er alt tað gloymt, nú hann spælir við arvafíggindanum.

Mest umtalaðu gestirnir, um teir kunnu kallast gestir, vóru eigararnir av Liverpool, Tom Hicks og George Gillett. Teir báðar hava verið í brennideplinum leingi, og viðhaldsfólkini hjá Liverpool halda lítið um teir. Liverpool-viðhaldsfelagið Spirit of Shankly(SOS) er so ónøgt, at tað undan dystinum skipaði fyri eini mótmælisgongu, fyri at fáa Tom og George at selja felagið. Mótmælisgongan endaði uttan fyri »The Kop«, og boðskapurin var greiður: »Yanks out!« Ónøgdin stavar frá, at Tom og George lovaðu, tá teir í 2007 keyptu felagið, at byggja nýggjan leikvøll og styrkja liðið. Enn eru ongar ætlanir komnar á borðið um nýggjan leikvøll, og fíggjarliga støðan hjá teimum báðum sigst ikki vera góð fyri tíðina.

### Baðibóltar, háðan og Gary Neville

Skemt er ein stórur partur av spælinum, tá tað kemur til viðhaldsfólk, og soleiðis var eisini á Anfield sunnudagin. Nógv umtalaði baðibólturin, sum kom í fokus, tá Sunderland skoraði ímóti Liverpool í síðstu viku, var upplagda temaið. So skjótt sum dysturin byrjaði, komu tíggjutals baðibóltar sendandi inn á vøllin frá Manchester United-viðhaldsfólkinum. Tað tók eisini eina løtu at fáa fyrsta hornasparkið í tí horninum avgreitt vegna baðibóltar.

Dysturin var ikki nógvar minuttir gamal, fyrrenn viðhaldsfólkini byrjaðu at syngja ymiskt minni pent um hvønn annan. Men største brølið kom, tá Sir Alex Ferguson sendi Gary Neville til upphiting. Gary Neville er illa dámdur av Liverpool-viðhaldsfólkinum. Tað er bygt upp á hatur ígjøgnum nógv ár og so eina »jubil senu« í 2006, tá hann valdi at jubla framman fyri Liverpool-viðhaldsfólkinum, meðan allir hinir leikararnir vóru í hinum endanum av vøllinum! Tað slapp Gary so at hoyra fyri, tá hann fór at hita upp!

### Dramatikkur, Owen og Torres

Tað mesta av dystinum var stemningurin á Anfield í topp, men dømdi dómarin ikki til heimaliðið, reistist hvørt mansbarn og fortaldi honum, at hann hevði skeivt. Tá hann so dømdi til Liverpool, kom øði í vitjandi viðhaldsfólkini. Jú, dómarin hevði eina torføra uppgávu.

Hálvan veg gjøgnum seinna hálvleik kom hol á. Ein frálík avlevering frá Yossi Benayoun sendi Frenando Torres avstað, og sekundið eftir lá bólturin í málinum. Anfield kókaði hesa løtuna, líka til Sir Alex valdi at skifta Michael Owen inn. Sjáldan hevur ein fyrrverandi Liverpool-leikari fingið eina so kalda móttøku frá Liverpool-viðhaldsfólkinum – »Judas«, »Where were you in Istanbul?« sungu tey. Hvørja ferð hann var í nánd av bóltinum, rópti alt Anfield eftir honum.

Tað komu tvey reyð kort í dystinum og tey kundu eins væl verið fleiri. Fyrsti maður av vøllinum var serbiski miðverjin hjá Manchester United, Nemanja Vidic, og tað til stóra frøi hjá Liverpool-viðhaldsfólkinum. Hetta eru triðju ferð á rað, at Vidic verður útvístur ímóti Liverpool. Stutt fyri dystarenda fekk argentinski liðskiparin á verjukenda miðvøllinum hjá Liverpool, Javier Mascherano, eisini sítt seinna gula kort, men hann bleiv klappaður av vøllinum fyri sín innsats. Hetta er aðru ferð, at hann fær reytt kort móti Manchester United.

Manchester United trýsti Liverpool fram ímóti dystarendanum, og Anfield var á pínubonkinum leingi. Men í tíðini, sum dómarin hevði lagt aftrat, avgjørdi David N'gog, til stóra frøði fyri meginpartin av Anfield, dystin við málinum til 2-0. Eyðkennislagið »You'll never walk alone« bleiv sungið av hjartanum, kreppan í Liverpool er fyribils avlýst og arvafíggindarnir sendir heim við ongum.

Sir Alex var róligur eftir dystin, men vildi vera við, at Jamie Carragher skuldi verið útvístur, eftir at hann háláði Michael Owen niður stutt uttan fyri brotssteigin. Eisini helt hann, at Jamie Carragher gjørdi brotsspark í fyrra hálvleiki, tá hann takláði Michael Carrick. Hann vildi somuleiðis vera við, at dómarin læt seg ávirka av stemninginum á Anfield. Sir Alex legði eisini aftrat, at sigurin var uppiborin. Hann helt, at hansara lið ikki reageraði nóg væl upp á skeivu dømingarnar, men nú var tað týdningarmiklasta at reisa seg aftur.

Benitez var í góðum lag og helt, at Liverpool hevði uppiborið sigurin. Benitez vildi vera við, at Liverpool-leikararnir eru betri, enn tey flestu geva sær far um, og hann var glaður fyri at teir vístu karakter á vøllinum. Men hann var eisini skjótur at minna teir á, at teir ikki kunnu fegnast um sigurin ov leingi.

### Gott vikuskifti fyri Liverpool og Chelsea

Liverpool, sum hevði tapt síðstu fýra dystirnar undan hesum, hevur altso fyribils steðgað krepputosinum. Tað gjørdi ikki vikuskifti minni gott, at øll hini toppliðini settu stig til, burtur sæð frá Chelsea. Manchester United, Arsenal, Manchester City, Aston Villa og Tottenham megnaðu ikki at vinna um vikuskiftið og tað merkir, at tað er blivið trongt í toppinum í Premier League. Fyri Liverpool er spurningurin, um hetta var vendipunktið fyri hetta kappingarárið, og fyri Manchester United er spurningurin, hvussu skjótt teir klára at koma á kósina aftur.